GJALDSTOVAN | TORSHAVN, 20. APRÍL 2018

# ÁRSFUNDUR HJÁ LANDSNETI

DORIT REINERT

GJALDSTOVAN




Tey síðstu 2 - 3 árini hevur nógv verið tosað um GDPR, ið er ES dátuverndarfyriskipanin, sum kemur í gildi í ES londum 25. mai. Hetta eru krøv, sum skulu tryggja rættindini hjá borgarum betri. T.d. fáa borgarar fleiri rættindi viðvíkjandi teirra persónsupplýsingum, t.d. at fáa tær rættaðar ella strikaðar og rætt til at fáa at vita, hvat tær verða nýttar til.




Føroyar eru sum kunnugt ikki í ES, men møguliga kemur tann lógin at verða galdandi í ávísum førum, t.d. tá vit veita onkra tænastu til ES lond, har persónsupplýsingar eru ein partur.

Tað sum hendir í Føroyum er, at Løgmansskrivstovan er farin undir at dagføra føroysku persónsupplýsingarlógina. Arbeiðið verður eftir ætlan liðugt síðst í ár.

Føroyska lógin kemur at leggja seg upp at ES reglugerðini, og tað er helst neyðugt fyri at kunna varðveita okkara triðjalands góðkenning sum eitt trygt land at flyta persónsupplýsingar til.

Munurin á verandi persónsupplýsingarlóg og tí nýggju verður ikki tann stóri, men lógin fer at verða handhevjað strangari enn í dag.

Eitt nú við størri krøvum til skjalfesting av hvussu vit lúka krøvini í lógini, og at skjalfestingin altíð er dagførd. Eisini at eftirlit verða skjalfest soleiðis, at man til eina og hvørja tíð greitt kann sanna, at man lýkur krøvini.

Størri krøv til altíð at vita hvørjar persónsupplýsingar stovnurin hevur skrásett, og hvar hesar upplýsingarnar eru, dataflow. Persónar hava krav til innlit sum í dag, so kanska skulu vit hugsa um, hvussu vit kunnu samla hesar upplýsingar.

Samtykki, um upplýsingarnar ikki eru neyðugar t.d. sambært lógum.

DPO  - ein, sum t.d. hevur ábyrgdina av at  verja persónsupplýsingar, nýggj funktión.

Bøtur (DK) – virkir upp til 4 % av umsetninginum tó í mesta lagi 20 mió. evrur, tað almenna upp til 4 % av rakstrarjáttanini tó í mesta lagi 16 mió.




**Hvussu fara vit til verka**

Vit á Gjaldstovuni hava umrøtt, hvussu vit kunnu fara undir arbeiðið. Í tí sambandinum hava vit skrásett nøkur hugskot, og hava lagt tey inn undir 'Trygdarpakkan', sum allir stovnar í Landsneti hava atgongd til. Kanska tit fáa okkurt burtur úr tí, men legg til merkis, at hetta eru bert okkara hugskot, um hvussu vit kunnu gera.

LÚKA VIT KRØVINI Í VERANDI PERSÓNSUPPLÝSINGARLÓG OG TRYGDARKUNNGERÐINI, SUM HAVA VERIÐ GALDANDI SEINASTU 15-20 ÁRINI, OG HAVA VIT KT TRYGDINA UPPÁ PLÁSS, SO ERU VIT VÆL VIÐ




GJALDSTOVAN

HTTPS://WWW.DATATILSYNET.DK/VEJLEDNINGER/VEJLEDNINGER-DATABESKYTTELSESFORORDNINGEN/

GJALDSTOVAN

WWW.
GJALDSTOVAN.
FO

KVÍGGJARTÚN 1, ARGIR
POSTBOKS 2009
110 TÓRSHAVN
FØROYAR

TEL (+298) 352 400
FAX (+298) 352 401
GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO

**GJALD**STOVAN